

# FISKIMÁLARÁÐIÐ ROYNIR EFTIR LØGFRØÐINGI

Fiskimálaráðið er í løtuni á eini leið við stórum avbjóðingum. Burtur úr rúgvuni kann nevnast arbeiðið at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap, og arbeiðið at menna FAS-skipanina og evna til lóggávu á m.a. tilbúgvingarøkinum. Í hesum sambandi dyrgja vit í fyrsta umfari eftir einum løgfrøðingi, ið vil hava eitt avbjóðandi, áhugavert og sjálvstøðugt starv. Mynstrað verður skjótast tilber, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Tekur tú kjansin, fært tú eitt starv við fjølbroyttum uppgávum í mennandi, yrkisligum umhvørvi. Hevur tú áhuga og áræði at taka lut í og ávirka umfatandi menningina, er Fiskimálaráðið rætta miðið.

Umsøkjarin skal hava lokið prógv sum løgfrøðingur. Umsøkjari, ið hevur staðið útbúgving sum búskaparløgfrøðingur ella bachelor útbúgving í løgfrøði er tó eisini vælkomin at søkja. Tú skalt duga væl at samstarva og eisini tora at vera í sjálvdrátti. Á brúnni í Fiskimálaráðnum starvast í løtuni ein løgfrøðingur. Komandi løgfrøðingurin fer fyri ein stóran part at ganga vakt saman við honum.

**Høvuðsuppgávurnar í starvinum eru at:**
- veita landsstýrismanninum, deildum og stovnum undir ráðnum løgfrøðiliga ráðgeving
- fyrireika lógaruppskot og kunngerðir
- viðgera kærumál
- málsviðgerða lógarspurningar í fiski-, sjóvinnu- og tilbúgvingarmálum.

Starvið verður sett sum skjótast sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya. Starvsøkið fatar um Fiskimálaráðið, stovnar undir Fiskimálaráðnum, Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Umsókn við avriti av prógvum, lívsgongdarlýsing og øðrum kann sendast til:

**Fiskimálaráðið**
**Heykavegur 6**
**Postsmoga 347**
**110 Tórshavn**

Umsóknin skal vera Fiskimálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin **11. september 2006 klokkan 12.00**. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Marjun Magnussen, leiðandi løgfrøðing á telefon 35 30 30 ella umvegis teldupost til marjun@fisk.fo. Lýsingin sæst eisini inni á www.fisk.fo.

www.fisk.fo

VIT DRAGA EINA LÍNU - VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI - VIT VILJA VITA - VIT BRÓTA SLÓÐ

*Fiskimálaráðið er eitt av sjey stjórnarráðum í miðfyrisitingini, sum veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum umsitur málsøkini fiskivinna, sjóvinna og tilbúgving. Fiskimálaráðið vegleiðir landsstýrismannin, soleiðis at avgerðirnar eru rættar og haldgóðar. Ráðið fyrireikar lógir, kunngerðir og reglugerðir, og hevur eisini eftirlit við, at ásettar reglur verða fylgdar. Somuleiðis rekir ráðið samskipandi uppgávur innan málsøkið hjá landsstýrismanninum, og tekur lut í millumlanda samráðingum, altjóða fiskiveiði- og sjóvinnufelagsskapum umframt norðurlendskum samstarvi.*

# Leiðari

## til musikkskúlan í Norðstreymoy (Vestmanna og Kvívík)

Musikkskúlin í Norðurstreymoy søkir hervið eftir leiðara.

**Musikkskúlin væntar, at umsøkjarar skulu**
- hava musikkpedagogiska útbúgving ella líknandi
- vera kveikjandi
- duga væl at skipa fyri
- hava góð samstarvsevni

Setunardagur eftir nærri avtalu.

Løn sambært avtalu, ið skal góðkennast sambært § 5, stk. 5 í kommunustýrislógini.

Umsókn saman við prógvi og møguligum ummælum skal vera Vestmanna kommunu í hendi í seinasta lagi 21. september 2006, kl. 12.00.

Musikkskúlin í Norðurstreymoy er partur av føroysku musikkskúlaskipanini.

**Vestmanna Kommuna**
**Kvívíkar Kommuna**

**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**

# Starv innan lønar- og starvsfólkaøkið

Søkt verður eftir fólki til lønar- og starvsfólkaøkið á Meginskrivstovuni í Havn.

**Í høvuðsheitum fevnir starvið um**
- lønaravgreiðslu
- málsviðgerð í samband við lønar- og starvsfólkamál
- at leiðbeina og ráðgeva starvsfólki í sáttmálaspurningum
- at ráðgeva leiðsluni í lønar- og starvsfólkamálum og sáttmálaspurningum

**Vit vænta, at tú**
- hevur skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
- dugir bæði at arbeiða sjálvstøðugt, men eisini í toymi
- tolir broytingar
- ert áhugað í at fara í holt við nýggjar avbjóðingar
- dugir væl at orða teg í skrift og talu

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert og sjálvstøðugt starv við nógvum avbjóðingum
- møguleikar fyri førleikamenning
- eitt arbeiðsumhvørvi har pláss er fyri látri

Umsøkjarar, sum ikki hava beinleiðis royndir innar lønar- og starvsfólkaøkið, eru vælkomnir at søkja, um tey hava aðrar fyrisitingarligar royndir. Góðir møguleikar eru fyri eftirútbúgving og skeiðluttøku.

Starvið verður lønt eftir førleika sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Sólvør Simonsen, tlf. 304014, ella Ingrid Gregersen, tlf. 304009.

Hevur starvið tín áhuga, send so eina umsókn við avriti av prógvum og viðmælum til

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Eirargarður 2, 2. hædd
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað: Regin Johansen, virkandi stjóri

Eisini ber til at senda teldupost til heimser@serforsorg.fo.

**Umsóknarfreist: 15. september 2006**